# Hugtakandi barnasangur



Knút Olsen undirvísir næmingunum í sangi í Kommunuskúlanum

**Í sambandi við at skotsk vika er í Havnini hesa vikuna, vóru børn úr øðrum flokki í Kommunuskúlanum og sungu á Tilhaldinum samstundis sum skotar vóru á vitjan har**

SANGUR
Myndir: Jens K. Vang
Tekstur: Solby A. Eliasen
solby@sosialurin.fo



*Skotsku gestirnir vóru sera hugtiknir av barnasanginum í Tilhaldinum týsmorgunin. Hetta var teirra fyrsta upplivilsi í Havnini. Tey vóru komin til landið seint mánakvøldið*

Barnasangurin, sum hoyrdist langan veg í Tilhaldinum týsmorgunin, var hugtakandi. Knút Olsen, lærari við Kommunuskúlan undirvísir børnunum í sangi. Og ikki kann annað sigast enn, at tey hava fingið væl burturúr. Tí ikki er so langt útliðið á skúlaárið enn, og longu dugdu børnini fleiri sangir uttanat.

Hóast tey eldru tóku væl undir við sanginum, so hoyrdust barnarøddirnar væl uppum. Púra ósmæðin stóðu ella sótu tey rundan um klaverið hjá Knúti og sungu. Og tað hugtók øll, sum inni vóru.

– Tað er altíð stuttligt at fáa vitjan, men hetta er nakað heilt serligt, helt onkur fyri, meðan børnini sungu.

Tað var eisini meira larmur inn í hugnaligu hølunum í Tilhaldinum hesa løtuna, meðan børnini vóru har. Men tað lat ikki til at órógva nakran. Tey eldru vóru ivaleyst fegin um at hava fingð børn á vitjan.Og at tey so sungu fyri teimum afturat – tað hevur ikki gjørt tað verri.

## Gamalt er eisini gott

Børnini hava saman við Knúti vant nakrar sangir í eina tíð. Knút greiddi frá, at hann var farin aftur til tað gamla, har børnini læra sangir uttanat.

– Tað verður ofta sagt, at fólk syngja so lítið í dag. Tað hongur uttan iva saman við, at onki verður lært uttan at longur, segði hann.

Hann legði afturat, at hann sostatt hevði gjørt av at fara at læra børnini sangir uttanat.

– Fyri tað um tað er ein gamal háttur at læra, so merkir tað ikki, at tað er nakað ringt, segði hann, og mong nikkaðu samtykkjandi við honum.

Børnini vóru sera spent, og tað sást á teimum, at tey høvdu glett seg sera nógv. Saman við Knúti og klaverinum sungu tey fyri, meðan øll tóku undir. Ein øðrvísi, men serstøk og stuttlig samanseting av fólki í sama rúmi, meðan tey sungu sangir og sálmar, sum eru vorðin fólkaogn. Umframt at tey eisini sungu á enskum fyri skotsku gestunum.



*Børnini í øðrum flokki í Kommunuskúlanum sungu av hjarta og sál fyri teimum eldru í Tilhaldinum*



*Onkuntíð var neyðugt at hyggja niður í sangheftið, men flestu sangirnar dugdu tey uttanat*

Langt vikuskifti frá hósdegi til mánadag




Njótið eitt langt vikuskifti frá hósdegi til mánadag í Aberdeen á einum av okkara fráliku gistingarhúsum.

**Patio** ★★★★
Vælumtókt gistingarhús við svimjihyli, venjingarrúmi, góðari matstovu og hugnaligari barr. Beint við Beach Boulevard.
Fyri hvønn í tvímanskamari **Kr. 2.995**

**Brentwood** ★★★
Hugnaliga gamla gistingarhúsið beint við Union Street við teimum fryntligu starvsfólkunum.
Fyri hvønn í tvímanskamari **Kr. 2.830**

**Skene House Rosemount** ★★★
Ráð tær sjálvum í eini íbúð við øllum hentleikum.
3 rúm (6 fólk). Fyri hvønn **Kr. 2.700**
2 rúm (4 fólk). Fyri hvønn **Kr. 2.750**
1 rúm (2 fólk). Fyri hvønn **Kr. 3.020**

**Ramada Jarvis** ★★★
Liggur mitt í meldrinum í Market Street.
Fyri hvønn í tvímanskamari **Kr. 2.750**

Íroknað: Flogferð við ferðaavgjøldum og innivist í 4 nætur við morgunmati.

SANSIR 355 355

Tú kanst bíleggja tína ferð hjá Atlantic Airways á telefon 34 10 40, 34 10 58 ella hjá tínari ferðaskrivstovu.

ATLANTIC AIRWAYS
Tel: 34 10 10 · Faks 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo

# Bilar

Nr. 186 • hósdagur • 2. oktober 2003 • 77. árg.

## Nýggjur Audi A6 í 2004

**Núverandi Audi A6 er frá 1997. Komandi ár kemur ein heilt nýggjur A6, sum verður tann fyrsti Audi við nýggja designinum, sum kemur at eyðkenna allar komandi Audi bilar**

BILAR
Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



*Komnadi Audi A6 verður ein smartur og framkomin luksusbilur*

Designstjórin hjá Audi, Walter da Silva, sum eisini teknar t.d. teir nýggju Seat bilarnar, verður skjótt klárur við einum heilt nýggjum Audi A6. Sum tað sæst á myndini, verður talan um ein sera smartan og framkomnan luksusbil. A6 liggur í stødd ímillum Audi A4 og tann størsta A8. Bilurin kemur í harða kapping við BMW og Mercedes.

Vit kunnu rokna við einum háteknologiskum bili, har nógvir av lutunum eru úr aluminium.

Nakrir av bensinmotorunum fáa nýggju FSI tøknina við beinleiðis bensinnspræning. Í fyrstu atløgu verður tann minsti motorurin ein 2,4 litur V6 við 170 hk, síðan ein 3,2 litur V6 við 240 hk og ein 4,2 litur V8 við 335 hk. Ein 3,0 litur V6 TDI við 220 hk verður eisini á skránni. Seinni kemur ein 2,0 litur 4 syl. TDI dieselmotorur við 140 hk og ein 5,0 litur 10 syl. FSI við umleið 500 hk.

## Renault Laguna »facelift« næsta ár

**Núverandi Renault Laguna verður broyttur nakað komandi ár. Bilurin fær t.d. nýggjar lyktir og kúfangarar, eisini verða nýggir motorar á skránni. Harða kappingin á marknaðinum er ein av orsøkunum til broytingarnar**

BILAR
Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



*Renault Laguna verður broyttur nakað í 2004, serliga framman við t.d. nýggjum lyktum, kølaragittari og kúgangara, eisini verða motorarnir størri og kvikari. Á tí minnu myndini er núverandi Laguna*

Renault Laguna fer nú at líkjast hinum nýggju Renault bilunum meira. Komandi ár verður bilurin broyttur nakað. Ein av orsøkunum til at Laguna verður broyttur nú er tann sera harða kappingin í hesum klassanum. Fyri at fylgja við mugu modellini verða "upp to date" alla tíðina.

At síggja til verður største broytingin framman, har eru t.d. nýggjar forlyktir, kølaragittar og kúfangari. Á tekniska økinum verða eisini broytingar. Teir tríggir 1,9 litur turbodiesel motorarnir fáa allir meira hestakreftir og 2,2 litur dCi motorurin fær 170 hk ístaðin fyri 150. Teir størru motorarnir fáa eisini tey umhvørvisvinarligu sótfiltrini.

Renault Laguna er annars ein sermerktur franskur bilur við tilsvarandi góðum og tryggum koyrieginleikum.

*Kelda: FDM / Motor*

### Nissan Dunehawk



Á bilaframsýningini, Frankfurt Motorshow, stóð hesin sjey persóna Nissan Dunehawk konseptbilurin. Bilurin er serliga ætlaður til amerikanska marknaðin at kappast við bilar sum t.d. BMW X5, Volvo XC90 og Lexus 300

*Kelda: Bil Magasinet*

### Navnið bleiv Picanto



Hesin Kia bilurin kom til Frankfurt Motorshow uttan navn. Navnið bleiv avdúkað á framsýningini: Kia Picanto. Bilurin, ið einans verður gjørdur við fimm hurðum, kemur í fyrstu atløgu við tveimum bensinmotorum. Dieselmotorurin kemur í 2005

*Kelda: Bil Magasinet*

### Renault BeBop



Renault BeBop er ein conceptbilur, sum møguliga verður avloysarin fyri Renault Clio. Bilurin hevur fýra sjálvstøðug setur, har tey aftaru kunnu leggjast saman og goymast undir forsetrunum. Renault BeBop kemur á marknaðin í 2005

*Kelda: Bil Magasinet*